# 4 HARUR BLIVU TIL 5000

**DJÓRALÍV** Tað var neyvan nøkur markering av degnum í august mánaði í ár, nú liðin eru 155 ár, síðani fyrstu harurnar vórðu settar út í Føroyum. Hóast hetta ikki varð gjørt, man lítil ivi vera um, at enn kemur lív í harumenninar hvønn 2. november, fyrsta harudag á árinum

## Fakta

### Størstar í Sandoy

Ein av áhugaverdu eygleiðingunum hjá Dorethe Bloch, leiðara á Djóradeildini á Náttúrugripasavninum er miðalvektin hjá haruni á teimum ymisku oyggjunum í tíðarskeiðnum 1948-2001.

Eftir hesum yvirliti at døma, viga harurnar á Sandoynni mest í miðal, nevniliga 2,944 kg. Beint í hølunum á Sandoyar-haruni er tann í Suðuroy ið einans vigar seks gramm minni, meðan haran í Skúvoy er tann minsta.

Annars sær yvirlitið yvir miðalvektina soleiðis út:

| Oyggj | Tal | Miðalvekt (kg) |
|---|---|---|
| Streymoy | 3,196 | 2,820 |
| Eysturoy | 773 | 2,608 |
| Vágar | 130 | 2,683 |
| Suðuroy | 284 | 2,938 |
| Sandoy | 78 | 2,944 |
| Borðoy | 230 | 2,776 |
| Viðoy | 156 | 2,721 |
| Kunoy | 49 | 2,704 |
| Svínoy | 23 | 2,800 |
| Nólsoy | 214 | 2,695 |
| Skúvoy | 38 | 2,374 |
| Samanlagt | 4,980 | 2,777 |

(Kelda: The Faroese Hare (Lepus timidus). Its history and acclimatization to the Faroe Islands (by Dorete Bloch))

Snorri Brend

Tað var helst ein ávísur spenningur á bryggjuni henda dagin í august mánaði 1855. Millum fólkini, ið vóru farin oman hagar, var sjálvasti amtmaðurin, Carl Emil Dahlerup.

Nakrar dagar áðrenn hevði eitt norskt skip sett kós móti Føroyum, fult av timbri. Umframt manning og farm, vóru eisini fimm harur úr økinum kring norska býin Kragerø við.

Tað var hesi sami 42 ára gamli amtmaðurin, ið eisini var íðin veiðimaður, sum stóð fyri hesum. Hann var komin til Føroyar seks ár frammanundan, og hevur helst ynskt at føroyingar eisini skuldu sleppa at veiða haru.

Samband var áður fingið við norskar myndugleikar, sum syrgdu fyri flytingini. Tíverri komu bert fýra teirra livandi fram til Føroyar í hesum umfarinum. Hesar vórðu síðani sleptar út á Kirkjubøreyni.

Líkt var til, at stórur áhugi var fyri ætlanini. Long tíð gekk nevniliga ikki, fyrrenn Dahlerup ynskti at fáa uppaftur fleiri árið eftir. Enn eru ongar keldur, sum kunnu siga, um fleiri harur soleiðis komu til landið.

Men tann dagin í 1858, sum seinni kom at gerast flaggdagur okkara, var aftur ein stórhending í hesum sambandi. Klokkan fýra seinnapartin kom nevniliga postbáturin higar við tí dýrabara farminum: Fýra harum aftrat.

Hesar fýra harurnar vórðu væl móttiknar og síðani fluttar út í Hornagarðin í Hornabø, haðani tær vórðu sleptar leysar eftir longu sjóferðina.

Líkt var til, at tær longu vistu hvar teirra komandi heim skuldi vera, tí sum skilst fóru tær spelandi í ein beinan sunnan, til frælsið, grýtuta lendið og vøkru náttúruna á Kirkjubøreyni.

Og harum so líkt, fingu tær eina løgu av ungum fyri og aðra eftir.

**Harum so líkt, fingu tær eina løgu av ungum fyri og aðra eftir. Bert 10 ár seinni kundu tær teljast í túsundatali**

Bert 10 ár seinni kundu tær teljast í túsundatali.

### Út um landið

Fyri mong var hetta ein stórhending, og ynskið var sjálvandi at alt skuldi spæla væl av. Tí varð heitt á fólk um ikki at skjóta harur tey fyrstu seks árini.

Hóast hesar átta harurnar vórðu fluttar við skipi higar, var líkt til at tær komu at trívast her og komu haraftrat skjótt fyri seg

Helst hevur tað eisini verið so, at fólk hava frætt um hesar fyrstu harurnar, tí nøkur ár seinni varð skipað soleiðis fyri, at harur eisini vórðu settar út í øðrum oyggjum: Í Eysturoynni í 1872, Kalsoynni í 1919, Kunoy og Vágar í 1920 og á Sandoynni so seint um í 1972.

Roynt varð somuleiðis at fáa haruna at støðast í til dømis Mykinesi, Nólsoy, Koltri og í Stóru Dímun. Men sum skilst vóru onkrar av hesum oyggjum helst ov smáar til at haran kundi nørast og støðast her.

Eingi hagtøl finnast um, hvussu nógvar harur eru kring landið í dag, tí eingin skylda er at upplýsa fong ella tal av veiðimonnum.

Fyri nøkrum árum síðani varð kortini mett, at eini 5000 pør vóru á teimum stóru oyggjunum, eins og á Kalsoy, Kunoy, Borðoy, Skúvoy, Fugloy og Viðoy.

**Haran sum er kynsbúgvin eftir bert átta mánaðum, leggur tríggjar ferðir um árið, einar 2-3 ungar hvørja ferð. Fyrsta løgan er í februar/mars; onnur í mai/juni og triðja í august/september**

### Spakar

Sum longu nevnt høvdu tey fyrstu pørini góð livilíkindi her á landi. Uttan iva var grýtuta lendið á Kirkjubøreyni til fyrimunar fyri innfluttu harurnar úr Noregi.

Umframt hetta er tað eisini ein sannroynd, at eingi hóttandi rovdjór funnust her, og tí vaks stovnurin skjótt og trygt frá fyrsta degi. Summar keldur vilja vera við,

*Framhald á síðu ??*